Starvslýsing

Stuðulstænastan

## Starvsfólk til tvørfakligt stuðulstoymi í Eysturoy og Norðoyggjum

Stuðulstænastan søkir eftir starvsfólki at arbeiða 30 tímar um vikuna í tvørfakligum stuðulstoymi í Eysturoy og Norðoyggjum til setan 1. feb..2009.

Málbólkurin hjá stuðulstoyminum eru heimabúgvandi fólk yvir 18 ár, ið hava skerdan likamligan og sálarligan virkisførleika.

Í Stuðulstænastuni starvast m.a. ergoterapeutur, námsfrøðingur og sjúkrarøktarfrøðingar

**Arbeiðsuppgávur**
- At stimbra og menna praktiskar og sosialar førleikar hjá brúkaranum
- At geva ráð og vegleiðing í vanligum dagligum virki
- At stimbra ígongdsetan av virksemi, ið brúkarin ynskir og hevur tørv á
- At vegleiða og samskipa samstarv við aðrar stovnar og mynduleikar

**Førleikakrøv**
Vit vænta, at tú:
- Hevur eina viðkomandi útbúgving og royndir innan økið
- Kann arbeiða sjálvstøðugt
- Hevur eina jaliga menniskjafatan
- Er opin, erlig/ur, virkisfýsin og menningarkunnað/ur
- Hevur hug og hegni til at arbeiða í einum tvørfakligum umhvørvi
- Kann handfara og trívast við einum arbeiðsdegi, ið einki kann sigast um frammanundan
- Er sterkur bæði til likams og sálar

**Stuðulstænastan kann bjóða**
- Eitt spennandi arbeiðspláss við møguleikum fyri persónligari og fakligari menning
- Ein virknan tvørfakligan starvsfólkahóp
- Samávirkan á gerandisuppgávur
- Undirvísing og supervision

Neyðugt er, at tú hevur koyrikort til bil.

**Lønar- og setanartreytir**
Umsøkjari við viðkomandi útbúgving fær løn eftir sáttmála millum avvarðandi fakfelag og Fíggjarmálaráðið. Aðrir umsøkjarar fáa løn eftir hjálparfólkasáttmálanum hjá Føroya Pedagogfelag.

Fleiri upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til við Heiði I. Tvørfoss, samskipara á tlf. 764301.

**Umsókn**
Send eina umsókn við prógvi og viðmælum til:

Nærverkið
Stuðulstænastan
Postsmoga 3037
110 Tórshavn
Stílað.: Regin Johansen, deildarleiðari

**Umsóknarfreist: 2. jan. 2009**

**Les meira á www.naerverk.fo/leys størv**

Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsumálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan · Postsmoga 3037 · 110 Tórshavn · Tel 36 00 00 · Faks 36 00 01 · meginskrivstovan@naerverk.fo

www.naerverk.fo

VINNUMÁLARÁÐIÐ

## Stjóri til Strandfaraskip Landsins

**Søkt verður við hesum eftir einum víðskygdum stjóra til Strandfaraskip Landsins at seta 1. februar 2009 ella skjótast til ber eftir hetta.**

**Starvsøkið**
Strandfaraskip Landsins er ein landsfyritøka og virkar sum rakstrar- og ráðleggingareind fyri almennu flutningstænastuna á sjógvi og á landi. Ræði og røkt av skipum og aktivum liggur hjá Strandfaraskipum Landsins.

Landsfyritøkan umsitur skyldu landsins at skipa fyri nøktandi sjóvegis fólka-, og farmaflutningi og landvegis fólkaflutningi. Busskoyringin er útveitt til privatar busseigarar at røkja. Samlaða ferðafólkatalið sum stovnurin flytur er um 1,2 mió. árliga. Harumframt umsitur Strandferðslan tyrluflúgvingina millum oyggjarnar.

Strandferðslan veitir árliga tænastur fyri góðar 170 mió. kr., harav 120 mió kr. verða játtaðar á fíggjarløgtingslógini, meðan 50 mió. kr. eru inntøkur frá ferðaseðla- og farmagjøldum. Tænastur stovnsins eru týðandi táttur í at binda landið saman, og tað liggur á Strandferðsluni at samskipa ymisku leiðirnar á besta hátt eftir tørvinum á staðnum og annars hjá øðrum ferðandi.

Uml. 170 fólk við rættiliga ymiskum útbúgvingum og førleikum starvast í dag víða um landið at røkja henda flutning, og ein stórur partur av teimum arbeiðir í skifti. Høvuðsskrivstovan og fyrisitingin av stovninum liggur á Tvøroyri.

**Starvið**
Sum ovasti leiðari á landsfyritøkuni fært tú ábyrgdina av at tryggja ein stabilan, effektivan og tryggan rakstur av flutningsuppgávuni hjá landsfyritøkuni. Tú skalt tryggja eina skilagóða fíggjarstýring, og at starvsfólkahópurin trívist og hevur røttu førleikarnar til uppgávurnar. Avbjóðingin hjá nýggja leiðaranum er framhaldandi at menna landsfyritøkuna og ta tænastu hon veitir kundunum.

Tað verður eisini tín uppgáva at síggja nýggjar møguleikar í virkseminum, og at menna hesar møguleikar til nýggj tilboð, til gagns fyri kundarnar og fyritøkuna.

**Umsóknir**
Heldur tú tað vera eina spennandi avbjóðing at standa á odda fyri hesari landsfyritøku, og kanst tú vísa á, at tú hevur hesar fortreytirnar:

- viðkomandi ástøðilig/ar útbúgving/ar og leiðsluroyndir frá privata ella almenna arbeiðsmarknaðinum,
- sýnd góð samstarvsevni og áhuga fyri leiðslu og starvsfólkamenning,
- og at tú ert framtakshugaður og innovativur,

**Setanartreytir og annað**
Starvið er lønt í 38. lønarflokki eftir sáttmálanum millum Tænastumannafelag Landsins og Fíggjarmálaráðið. Setanartreytir annars verða ásettar í sersáttmála við Vinnumálaráðið.

Umsóknin skal verða Vinnumálaráðnum í hendi í seinasta lagi 30. desember 2008.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Vinnumálaráðið, Arne Poulsen, aðalstjóra.

**Vinnumálaráðið**
Tinganes
Postrúm 377
110 Tórshavn

GISTING V/MORGUNMATI · SKEIÐ · FUNDARVIRKSEMI




Tel. 238877 · info@hotelrunavik.fo · www.hotelrunavik.fo

ókeypis.fo
...fá meira fyri einki!
Fær inn á ókeypis.fo og svara nøkrum spurningum og verð við í lutakastinum um góðu vinningarnar!